## VIÐMERKINGAR

# Tvær lógir sum styrkja okkara sjálvstýri

**Jóannes Eidesgaard,**
*løgmaður*



Yvirtøkulógin og uttanríkispolitiska lógin eru tvær lógir, sum broyta viðurskiftini við Danmark. Báðar lógirnar víðka um okkara heimildir. Yvirtøkulógin staðfestir, at Løgtingið ger av, nær og hvørji málsøki vit yvirtaka. Uttanríkislógin víðkar munandi um heimildir okkara til at virka á altjóða pallinum. Í báðum hesum lógum mugu vit samstundis viðurkenna, at vit eru í felagsskapi við Danmark - alt annað vildi verið at arbeitt í einum teoretiskum heimi.

### Sama lóg á tveimum málum

Við hesum lógunum samtykkja Løgtingið og Fólkatingið lógatekstir, sum eru fullkomiliga eins í báðum londum, bara á hvør sínum máli. Einans lógatekstirnir verða kunngjørdir alment í kunngerðablaðnum, og tað eru hesir tekstir, danskir og føroyskir myndugleikar og almenningur hava at halda seg til. Danir til danska tekstin og føroyingar til føroyska tekstin.

Tað kann sjálvandi tykjast ørkymlandi, at tað eru tvey sett av viðmerkingum til hesar báðar lógirnar - danskar viðmerkingar til rískislógartilmælini og føroyskar viðmerkingar til føroysku lógirnar.

Viðmerkingarnar eru ætlaðar Fólkatinginum og Løgtinginum at greiða frá støðuni uttanum uppskotið, men eru á ongan hátt løgfrøðiliga bindandi, tí tær eru ikki lóg. Danir hava sína fatan av støðuni - føroyingar sína, og tí eru viðmerkingarnar ikki tær somu. Tað hevur ikki stóran týdning, so leingi partarnir eru samdir um tann tekstin sum bindandi er, nevniliga lógatekstin.

Lat meg gera tað fullkomiliga greitt: Hjá landsstýri og løgmanni finnast ikki skuggar av iva um, at løgtingslógir hava fult gildi í Føroyum, og at tað er Løgtingið sum løggevur í Føroyum. Tí er tað burturvið at siga, at føroysku lógirnar um yvirtøku av málsøkjum og um uttanríkispolitiskar heimildir eru uttan innihald, tí at donsku ríkislógartilmælini eisini eru samtykt. Tað er tað sama sum at siga, at danir hava løggevandi valdið í Føroyum, og at løgtingslógir eru á lægri stigi enn fólkatingslógir.

### Politikkur og ikki jura

Politikkur er at arbeiða miðvíst fyri at fremja eina søk, tú trýr uppá. Politikkur er at tryggja, at okkara rættarstøða ikki verður sett í vága. Og politikkur er sanniliga eisini at vinna fram vegin, hóast ymiskar tulkingar kunnu vera um løgfrøðina - ikki at stara seg blindan uppá ósemjurnar. Gert tú tað, kanst tú sera lættliga koma til ta niðurstøðu, at her slepst ongan veg. Her ber einki til. Alt ella einki. Svart ella hvítt.

Í verandi støðu okkara, sum partur í ríkisfelagsskapinum, hava vit tríggjar møguleikar at velja í:

1) At varðveita heimastýrislógina í verandi líki. Tað merkir status quo. Vit flyta okkum ikki úr stað.

2) Bert at samtykkja uppskotini til ríkislógartilmæli. Tað merkir einans at seta í gildi donsku lógirnar. Hetta er tað sama sum at viðurkenna, at í Føroyum eru tað danir sum ráða, og at føroyingar ikki hava løggávuheimild í Føroyum.

3) At seta í gildi dupultu løggávuna - føroysku lógirnar við føroysku viðmerkingunum og ríkislógartilmæli við donsku viðmerkingunum. Hetta er at strika undir, at í Føroyum verður ongin hægri fyriskipað lóg framd, er hon ikki føroysk. At danir so við síðuna av hava eina einsljóðandi lóg er ein sannroynd, ið stendst av, at danska stjórnin hevur eina aðra fatan av stjórnaskipanarligu støðuni hjá Danmark mótvegis Føroyum.

Hóast vit við hesum viðurkenna, at føroyingar og danir ikki hava heilt somu tulking av støðu okkara, so er full semja millum okkum og danir um, at vit ikki vilja lata hesa ósemjuna forða okkum í at arbeiða og at fremja tey mál, vit hava sett okkum. Okkara mál er at vinna føroyingum størri ábyrgd og vald á egnum viðurskiftum. At kunna virka so frítt sum til ber, óheft av donskum myndugleikum. Báðar hesar lógirnar eru slík amboð!

### Vit vilja úrslit

Hetta er veruligur politikkur. Hetta er at arbeiða. Hetta er at nokta at lata seg forða av ólíkum tulkingum av, hvørt vit eru føroyingar ella vit eru danir, sum búgva í Føroyum. Vit vita, at vit eru føroyska tjóðin, sum býr í Føroyum. Og vit vita eisini, at danir hava aðra fatan av hesum.

Tað er eitt paradoks, at tey sum nú rópa harðast móti hesum lógunum, eru tey, ið áttu at verið glaðast fyri lógirnar, ið hvussu so er sum eitt millumstig á leiðini til fjórða møguleikan, ið er loysing frá Danmark. Tað, andstøðan sigur er: fáa vit ikki loysing, vilja vit einki hava. Status quo - tað vil siga eina heimastýrislóg, ið langt síðani er farin um seinasta haldførisdag.

Hetta er ein spurningur um, hvør ræður í Føroyum. Hetta landsstýrið metir, at Løgtingið, er ovasti politiski myndugleiki okkara. Tí taka vit støði í føroysku løggávuni, sum verður samtykt á Løgtingi. Vit ivast ikki í, at Løgtingið er ført fyri at taka eina og hvørja avgerð um Føroyar.

# Yvirlýsing frá Miðflokkinum

### Yvirlýsing viðvíkjandi aktuellu kreppuni á Landssjúkrahúsinum og føroyska arbeiðsmarknaðinum





**Vegna Miðflokkin**
*Bill Justinussen og Jenis av Rana*

Við undran lýtur Miðflokkurin at teimum broytingum, ið sjúkrahúsleiðslan og landsstýrismaðurin í heilsumálum hava sett í verk- og teirri harav skaptu arbeiðsmarknaðarkreppu. Felags fyri broytingarnar á føðideildini, á psykiatriska deplinum og innan sjúkraflutning tykist vera ein arrogansa, sum ikki er vanlig á okkara leiðum. Um samráðst varð yvirhøvur, so vóru hesar við útvaldar partar, meðan onnur, herundir fakfeløg, eru vanvird.

Ein og hvør við minstu royndum ella útbúgving á økinum veit, at skulu broytingar gerast á arbeiðsplássum, so er avgerðandi fyri, um hesar skulu eydnast, at tey, ið broytingarnar fevna um, kenna seg vird, eru kunnaði um og tikin við uppá ráð. At loyva útvaldum pørtum innlit, og, sum í aktuella stríðnum á landssjúkrahúsinum, at útiloka fekfeløg teirra raktu, er burturvið- og leggur upp til stríð.

Eitt arbeiðspláss sum landssjúkrahúsið, har so mangir og ymiskir fakbólkar hava sítt dagliga virki, setur stór krøv til leiðsluførleika, serliga samstarvsevnum viðvíkjandi. Júst trístreingjaða leiðslan átti at borga fyri hesum, men tað tykist sum um hendan leiðsla, heldur enn at virka fyri friði, misnýtir sín rætt at leiða til at trýsta ígjøgnum útvtvald sjónarmið. Slíkt kann ikki annað enn elva til stríð, og er tað júst vanlukkuliga støðan, vit eru endaði í. At hetta stríð nú hóttir við at breiða seg til alt samfelagið varð eyðsýnt, og átti politiksa leiðsla landsins at havt steðga hesum, áðrenn tað hendi.

Miðflokkurin heitir staðiliga á leiðslu landssjúkrahúsins, landsstýrismannin á økinum og virkandi samgongu, um at virða føroysku fakfeløgini og heldur enn at provokera við m.a. fútarætti, við opnum sinni at bjóða til samráðingar. Núverðandi støða, har sjúkrahúsleiðslan hevur tikið sjúklingin, og samgongan fakfeløgini, sum gíðslar, er alt annað enn virðilig- og tænir ongum til sóma.

# Sjúkrahúsleiðslan ikki nokta fund

**Poul Geert Hansen**
*Sjúkrahússtjóri*



Nýtslan av fútarættinum í sambandi við ósemjur á arbeiðsmarknaðinum var til viðgerðar í fimmaranum tann 11. mai 2005. Útvarpsverturin legði stóra áherðslu á, at tað ítøkiliga málið á Landssjúkrahúsinum ikki skuldi viðgerast.

Kortini vóru tað fleiri, sum ikki kundu lata verða við tí. Ein av teimum var Jana H. Dalsgaard, formaður í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, sum út móti endanum av sendingini ringdi inn. Hon segði m.a. at leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevði noktað at tosa við nevndina í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Hetta passar ikki. Tvørturímóti hevur leiðslan á sjúkrahúsinum játtað at komið á hvønn einasta fund nakar hevur biðið um, í sambandi við fráboðaðu umleggingarnar. Bæði í hoyringstíðarskeiðnum fyri ætlaðu broytingunum og aftaná at avgerðin var tikin. Tað hava eisini verið nógvir fundir við starvsfólk, álitisumboð, fakfeløg og áhugabólkar.

Fundir hava eisini verið við Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar. Leiðslupersónar frá Landssjúkrahúsinum hava luttikið við innleggjum á limafundi í felagnum og fundur hevur eisini verið við nevndina í felagnum. Ein fundur er tó blivin av ongum, tí felagið setti treytir við, hvør mátti luttaka frá Landssjúkrahúsinum. Tað skal leggjast afturat, at sjúkrahúsleiðslan eisini hevur givið felagnum skriftlig svar upp á spurningar.

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur fylgt øllum ásetingum í starvsfólkapolitikkum, sáttmálum og øðrum í sambandi við umleggingarnar á føðideildini/ljósmøðraskipanini. Allir partar eru blivnir hoyrdir og nógvar viðmerkingar eru komnar inn. Hoyringssvarini eru viðgjørd bæði væl og virðiliga, áðrenn sjúkrahúsleiðslan hevur tikið avgerð um umleggingarnar.

Sjúkrahúsleiðslan hevur alla tíðina staðið fast við, at ongar samráðingar verða um umleggingarnar. Partarnir eru hoyrdir og hava framlagt síni sjónarmið, men tað er leiðslan, sum tekur avgerðina. Hetta er ein partur av sjálvsagda leiðslurættinum og tað samráðast vit ikki um. Men vit hava ikki noktað, at fundast við nakran.

Í samband við, at broytingarnar á samanløgdu deildini verða settar í verk, vilja starvsfólkini á deildini fáa møguleika til at luttaka í umleggingunum og fáa ávirkan á teirra arbeiðspláss. Báðir starvsbólkar eru væl umboðaðir í leiðsluni á deildini. Hesin leiðslubygnaðurin tryggjar, at vit røkka endamálinum við umleggingunum, at fáa eina eina betri góðsku og kontinuitet í samlaðu tænastuna hjá føðideildini/ljósmøðraskipanina og samstundis fáa ein meiri rationellan rakstur av deildunum.